## Nýggjur umboðsmaður

Fríggjadagin stóð Hans Jacob á Líknargøtu royndina sum spælaraumboðsmaður innan fótbólt. Hetta er roynd, sum verður skipað eftir FIFA-leisti tvær ferðir um árið, og er Hans Jacob triði føroyingurin, sum hevur staðið royndina. Hinir báðir eru Jákup í Stórustovu og Ólavur Waag Høgnesen. Hans Jacob hevur tó ikki loyvi at virka sum leikaraumboðsmaður enn. Hann skal fyrst tekna eina ábyrgdartrygging í einum góðkendum tryggingarfelagi. Síðani skal umboðsmannayvirlýsingin undirskrivast og sendast FSF. Tá ið FSF hevur fingið tryggingarskjalið og treytirnar, og umboðsmannayvirlýsingin er undirskrivað, útskrivar FSF loyvisbræv sum spælaraumboðsmaður.



## B71 fekk ikki viðhald

Mest umrøddi leikarin í Formuladeildini í ár, Magnus Olsen, hevur nú fingið greiðu á, hvar hann sleppur at spæla komandi ár. B71 og B36 hava leingi togast um spælaran, og fyri stuttari tíð síðan kom FSF til ta niðurstøðu, at Magnus Olsen kundi skifta til B36. Hetta gekk B71 ikki við til, og hóast tað stóð í niðurstøðuni, at teir ikki høvdu loyv at kæra víðari, valdu teir at kæra víðari til Yvirkærunevndina vísandi til §12, har í ávísum førum er loyvi at kæra til Yvirkærunevndina. FSF boðaði í gjár frá, at hetta málið ikki hoyrir undir §12, og at Yvirkærunevndin ikki hevur heimild at viðgerða kæruna frá B71.

B71-AB 4-0 (1-0):

# Rasmus stygdi frensarnar

**Við einum reinum hat-trick varð Rasmus Nielsen dagsins maður, tá hann og B71 sendu AB úr kappingini um Løgmanssteypið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Sandoyingar eru nú í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið. AB megnaði ikki at standa seg móti hart arbeiðandi heimaliðnum, tá teir vitjaðu á Sandoynni*

Tað kann væl vera, at brasilski Clayton Soares er størsta álopsessið hjá B71. Men í gjár var tað Rasmus Nielsen úr Skopun, sum tók yvirskriftirnar.

Sum skilst, so var dysturin langt ífrá av teimum best spældu, og alt bendi eisini á ein málleysan fyrra hálvleik, tá Rasmus fyrstu ferðina tók sakina í egnar hendur. Hann trekti inn eftir vøllinum, og við einum fløtum skoti sendi hann bóltin í kassan til hálvleiksleiðsluna.

Og so var Rasmus annars av álvara tendraður til seinna hálvleik. AB royndi tó at hanga í, men 12 minuttir fyri leiklok var skopuningurin aftur upp á spæl. Símin Hansen sendi Rasmus avstað, áðrenn hesin úr spískum økti til 2-0, og løtu seinni var lyfti Gudmund Nielsen upp um verjuna, og so var Rasmus aftur fyrstur á.

AB hevði undan triðja málinum hjá Rasmusi sín besta møguleika, men tað gjørdist stólpin og út heldur enn inn. Og tá Clayton Soares stutt fyri dystarlok setti sítt merki á dystin, var tað bert ein staðfesting av einum sigri, ið helst var nakað nógv greiðari, enn Argjamenn hildu vera rættvíst.

**B71-AB 4-0 (1-0)**
1-0: Rasmus Nielsen, 45
2-0: Rasmus Nielsen, 72
3-0: Rasmus Nielsen, 78
4-0: Clayton Soares, 88

07 Vestur-B36 2-2 (0-0) 6-7 eftir brotsspørk:

# Vestur hevði Formula á knøunum

**Brotsspørk skuldu til, áðrenn B36 kundi vissað sær víðari atgongd í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tók sína tíð hjá B36 at koppa undirtippaðu 07 Vestur, tá liðini í gjár spældu fjórðingsfinalu í kappingini um løgmanssteypið.

Hóast ein deild er á muni millum liðini, so høvdu vágamenninir avgjørt sítt orð at siga í dystinum, ið gjørdist eins tættur, sum steypadystir kunnu verða.

Sum fyrri hálvleikur leið, høvdu gestirnir hvassastu royndirnar, men Karoly Potemkin megnaði ikki at seta bóltin í meskarnar, hóast hann tvær ferðirnar var leysur við málverjanum.

Ingi Højsted fekk tó sett hol á stutt eftir steðgin, tá hann varð sendir avstað, men tá sami Ingi Højsted noyddist skaddur av vøllinum lítla løtu seinni, merktist hetta væl hjá B36.

Og tað dugdu vertirnir at gera sær dælt av. Eftir lítlari løtu hevði Jens Erik Rasmussen snarað øllum á høvdinum, tá hann við tveimum málum hevði lagt 07 Vestur framum, og so stóð brádliga heilt nógv á hjá gestunum.

Tað eydnaðist tó Potemkin at javna, soleiðis at longd spælitíð skuldi til, og tá eingin avgerð fall í hesum, gjørdist neyðugt við brotsspørkum. Og her vístu gestirnir seg sum teir stinnastu, tá teir skoraðu upp á øll síni brotsspørk, meðan gestirnir misnýttu eina av sínum fimm royndum.

**07 Vestur-B36 2-2 (0-0)**
6-7 eftir longda spælitíð og brotsspørk
0-1: Ingi Højsted
1-1: Jens Erik Rasmussen
2-1: Jens Erik Rasmussen
2-2: Karoly Potemkin